## 3.1. Skúlabygging

Seinasta skúlastýrið sat sum bygginevnd fyri skúlabyggingina, men tað nýggja bygdaráðið gjørdi av at seta eina byggileiðslu, tá ið arbeiðið fór í gongd. Skúlastýrið verður kunnað um gongdina.
Arbeiðið byrjaði í apríl 2009, og tað hevur gingið rímiliga væl; var tó eitt sindur tarnað av kavaveðrinum, sum vit høvdu. Arbeiðið verður væntandi liðugt í desember 2010, so skúlin kann takast í brúk eftir jólafrítíðina.

Næmingar og lærarar siga, at skúlabyggingin ikki hevur órógvað skúlagongdini nakað serligt.

## 3.2. Felags foreldrafundur.

Leiðslan í Stranda Skúla ætlar at arbeiða við " sjálvsstýrandi toymum" frá skúlaárinum 2010/2011. "Sjálvstýrandi toymi" er ein arbeiðs-háttur, har tað eitt nú ber til at arbeiða tvørtur um flokkarnar. Til dømis kunnu nakrir lærarar hava eitt toymi, har teir arbeiða við 1., 2. og 3. flokki um allar lærugreinirnar, og teir kunnu soleiðis sjálvir leggja lesiætlanina til rættis og arbeiða við næmingunum tvørtur um floksmørk.

Til foreldrafundin í ár hava vit fingið Marin Elisabeth Poulsen, sum er ættað av Skála, búsitandi í Århus, at koma heim úr Danmark at kunna okkum um "LP- modellið", sum sær út til at verða ein framúrskarandi arbeiðsháttur til eitt sjálvsstýrandi toymi. Marin Elisabeth Poulsen arbeiðir á einum skúla, sum royndarkoyrir hesa skipanina.

LP stendur fyri "Læringsmiljø og Pædagogisk analyse" - "Læru-umhvørvi og Pedagogisk greining".

Alt hetta fáa vit meira at vita um á felags foreldrafundinum

**mikudagin 24. mars 2010 kl. 18.30. Vælkomin!**




**Til øll foreldur at næmingum í STRANDA SKÚLA**

Skúlastýrið bjóðar til felags foreldrafund
mikudagin 24. mars 2010 kl. 18.30

**Evnið er: SJÁLVSTÝRANDI TOYMI OG LP-MODELLIÐ**
(LP: **L**æru-umhvørvi og **P**edagogisk greining)

Fyrilestur: **Marin Elisabeth Poulsen,**
sum starvast á einum skúla í Århus,
har arbeitt verður eftir hesi skipan.

# Ársfrágreiðing frá skúlastýrinum fyri Stranda Skúla
### Skúlaárið 2008/2009

## 1. Manningin í skúlastýrinum.
Í skúlastýrinum eru 7 limir: 3 foreldraumboð, 1 læraraumboð, skúlastjórin og 2 kommunuumboð.

Í sambandi við kommunuvalið í nov. 2008 skuldi eisini veljast foreldraumboð til skúlastýrið í Stranda skúla, og hesi vóru vald: Eyðleyg í Garði, Strendur, Joan S. Johannesen, Strendur og Artur Johansen, Strendur.

Skúlastýrið skipaði seg við Eyðleyg í Garði sum formanni, Joan S. Johannesen sum næstformanni og Artur Johansen foreldraumboð.
Í august 2009 ynskti Eyðleyg at sleppa úr formanssessinum, og tí varð avgjørt, at Joan bleiv formaður og Eyðleyg næstformaður.
Foreldraumboðini eru: Joan S. Johannesen, formaður, Eyðleyg í Garði, næstformaður og Artur Johansen, foreldraumboð.
Kommunuumboðini eru Bettina Christiansen og Súsanna Andreasen. Læraraumboðið er Mariann D. Poulsen. (Marion Poulsen var læraraumboð fram til august 2009)

## 2. Manningin í skúlanum.
Í skúlanum eru í løtuni 180 næmingar, harav 80 í framhaldsdeildini og 100 í barnadeildini. 22 lærarar starvast við skúlan.

### 2.1. Starvssetanir
Í hesum skúlaárinum vórðu hesi sett í tíðaravmarkað starv: André Fr. Danielsen, Heidi Abrahamsen, Asbjørg Norðberg og Marian Cirloganescu. Í farloyvi: Ásbjørn Berthelsen.

### 2.2. Skúlin

Í hesum skúlaárinum hevur bara ein partur av skúlagarðinum verið tøkur vegna byggivirksemi. Økið niðan fyri skúlan, sum varð gjørt í evnisvikuni fyri summarfrítíðina, er komið væl við, serliga hjá teimum yngru næmingunum. Næmingarnir hava tó verið meira inni í fríkorterunum enn annars; og fyri at víðka um tilboðið hevur bókasavnið verið opið í næstan øllum fríkorterum.

## 3. Fundir

Í hesum skúlaárinum hevur skúlastýrið havt 6 fundir. Á hvørjum regluligum fundi hevur skúlastjórin "kunning frá skúlanum". Hetta er bæði áhugavert og viðkomandi, tí í síðsta enda snýr virksemið í skúlastýrinum seg um, at skúlin skal vera eitt gott og læruríkt stað hjá børnum okkara, samstundis sum hann skal vera eitt gott arbeiðspláss hjá teimum, sum har starvast. Vit hoyra somuleiðis um útferðir og vitjanir, terminsroyndir, verkætlanir, jólahald og onnur tiltøk. Eisini verður kunnað um dagligu gongdina, eins og mannagongdir í skúlanum verða umrøddar og staðfestar.

Skúlastýrið hevur ein fund um árið við lærararnar og ein felagsfund við skúlastýrini við Skála og Oyndarfjarðar skúla.
Á fundinum við lærararnar kemur vanliga onkur uttaneftir at halda fyrilestur, og farið verður eisini at eta ein bita saman.
Á felagsfundinum við skúlastýrini fyri Skála og Oyndarfjarðar skúla tosaðu vit um ymiskt, millum annað hvat vit kunnu samarbeiða um, og hvat framtíðin hevur at bjóða.